# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt tignarligt útkast

Í gjár fingu vit umsíðir høvi at síggja uppskotið til nýtt tinghús, sum Palli Gregoriusen, arkitektur, hevur gjørt eftir áheitan frá formansskapinum í løgtinginum.

Tað var eisini væntandi, at kritiskar røddir fóru at hoyrast – tí tað er tað vanliga, tá slík uppskot koma fram. Hinvegin kunnu vit sjálvandi geva teimum rætt í, at tað tykist løgið, at Føroya Løgting longu skal hava nýggj høli – áðrenn síðsti seymur er nelgdur í nýumvælda løgtingshúsið og gamla telefonverksbygningin.

Tað sum vit kunnu læra av hesum til eina aðru ferð er at brúka vit og skil og lata serkunnleikan tala. Vit sóu fólkaøsingina í sambandi við arkitektakappingina, sum varð útskrivað á sinni um at gera nýtt tinghús. Úrslitið gjørdist hvørki fuglur ella fiskur, tí vit vildu bæði hava eitt nýtt og eitt gamalt hús.

Tað er áhugavert, at løgmaður nú er farin at tosa um, at Føroyar skulu verða fíggjarliga óheftar av blokkinum áðrenn 2015. Samstundis sigur formaður Tjóðveldisfloksins, at eitt slíkt nýtt tinghús hevði verið hóskandi til einar sjálvstøðugar Føroyar.

Um Edmund Joensen og Heðin Mortensen nú skulu ganga á odda til tess at fáa til vega eitt nýggjan tignarligan karm um okkara gamla ting, so er hetta kanska eitt høvi.

Vit skulu sjálvandi ikki leypa fram av og byggja nýtt tinghús í óðum verki, men uppskotið hjá Palla Gregoriusen er eitt sera spennandi útkast til eitt kjak um, hvussu vit framyvir skulu skapa karmin um lóggávuvald okkara.

**Sosialurin**

# Fjald dagsskrá aftan fyri nýggju løgtingshúsini



**BEATE L. SAMUELSEN**
Býráðslimur í Havn

Løgtingsins formansskapur stendur neyvan einsamallur aftan fyri ætlanina av byggjan løgtingshúsum á Eystaruvág. Tað skuldi verði løgið, um ikki kransakøkufigururin í einum øðrum formansskapi í gannalagnum hevur ein leiklut í húsahandlinum, sum gerast skal.

Í útvarpinum vistu tey í tíðindasendingini kl. 18 fríggjakvøldið at siga, at býráðið í Havn var kallað saman í sambandi við eitt hastimál. Hetta snúði seg um at keypa løgtingshúsini við Tinghúsvegin, tí nú skuldi eitt nýtt byggjast á Eystaruvág fyri 122 mió. kr.

Eg kann upplýsa, at hetta var ikki nakar býráðsfundur, sum útvarpið segði, men ein innbjóðing til eina framløgu í sambandi við, at løgtingið hevði gjørt eina ætlan um at byggja nýtt løgtingshús á Eystaruvág í Havn.

Sama framløga var nakrar tímar undan sýnd løgtingslimum, beint eftir at teir høvdu avgreitt seinasta málið og vóru í ferð við at ynskja hvør øðrum eitt gott summar.

Á sama hátt sum flestu løgtingslimir sótu sum Kánus, tá teir vóru kunnaðir hesa ætlan, uttan floksformenninir og formansskapurin í Tinginum, men klappaðu, tá hon var liðug, sótu eisini nøkur okkara og gapaðu, tá Palle Gregoriussen, arkitektur, framlegði ætlanina í býráðssalinum.

Nú vóru vit ikki so nógv, bara sjey býráðslimir, tríggir deildarleiðarar, kommunustjórin og so ein fyrrverandi býráðslimur og borgarstjóri og núverandi løgtingsmaður, Poul Mikkelsen, sum til stuttleikar kom inn at vitja okkum hesa løtuna. Hann var sum so eisini kunnaður um hetta.

Har er einki ófort.

Arkitekturin hevði eftir áheitan frá formansskapinum í Løgtinginum teknað ein høgan og snøggan bygning úti á Eystaruvág, millum Kongabrúnna og Bursatanga. Eg haldi, hann var trimum hæddum. Har manglaði einki.

Viðgangast má, at hann var sera vakur.

Undir bygninginum, niðri í sjónum, var sprongt út til ein undirsjóarparkeringskjallara til 52 bilbásar.

Og so gekk ein høg bogakend brúgv allan vegin uppum skip og sjógv yvir á Tinganes.

Byggitíð 36 mánaðir. Kostnaður 122 mió kr. - við øllum. Nei ikki rættiliga øllum. Tí arkitekturin hevði teknað eitt fleiri metrar høgt listaverk í litføgrum glari á økinum áraka Bursatanga.

Tað kann Tróndur Patursson kanska sleppa at gera, helt hann. Men tað var bara tað, listamaðurin visti einki um hetta annað enn tað, sum arkitekturin leysliga um telefon líka hevði greitt honum frá og sum kundi verði eitt hugskot.

### Parkeringshús í trimum hæddum

Einki serligt var nevnt um tann handil, ið útvarpið annars visti at siga frá hetta sama kvøld, nevniliga at Tórshavnar býráð lá framvið at keypa umvældu og nýistandgjørdu Tinghúsini, tá løgtingið einaferð flytur inn í nýggja bygningin á Eystaruvág.

Tað kann væl hugsast, at tað er onkur í Tórshavnar býráð, ið hevur havt ein fingur við í spælinum um hesa ætlan, tá tíðindini bórust um áhugan hjá Tórshavnar býráð at keypa gomlu løgtingshúsini.

Tí á tekningini er alt parkeringsøkið á Eystarubryggju undir Bumshamri gjørt um til eitt innilokað parkeringshús. Tá nýggju løgtingshúsini skulu vera í trimum hæddum, so skal parkeringshúsið hjá býráðnum við pláss fyri meiri enn trý hundrað bilum eisini vera í trimum hæddum. Minni kann ikki gera tað.

Tað er neyvan formansskapurin í løgtinginum, ið hevur biðið um ta ætlanina! Og løgtingið fer neyvan heldur at gjalda ta rokningina!

Hvør tað so kann vera, sum hevur biðið um at fáa eitt parkerkingshús á Eystarubryggju, kunnu fólk sjálvi gita. Tann, sum gitir rætt, fær ongan vinning, men eina feita rokning til ta tíð. Tað sama fáa øll hini, sum ikki gita rætt.

### Spælið aftan leiktjøld

Í mínum hugaheimi var ætlanin við snar-innbjóðingini fríggjakvøldið til býráðslimir í sambandi við framløguna av nýggju løgtingshúsunum á Eystaruvág ein kunning um, hvat vit kunnu vænta okkum av umsóknum í sambandi við byggiloyvir og broyting av byggisamtyktum á økinum á Kongabrúnni, Eystaruvág og har umleiðir. Tað verður ikki lætt. Eystaravág hevur einki matrikulnumnar á sjónum til at byggja løgtingshús ella nakað annað á.

Tað skínur ígjøgnum málið, at undan fyrireikingunum til nýggja løgtingshúsið, hevur formansskapurin í løgtinginum, sum plágast av umbyggingarskriða, havt eitt ávíst samstarv við kransakøkufigurin í formansskapinum Tórshavnar býráð um at keypa løgtingshúsini við Tinghúsvegin fyri einar 100 milliónir krónur.

Men tað vita vit aðrir býráðslimir bara einki um.

Og hvør situr eftir við rokningini? Tú og eg.

Allir føroyingar sleppa at gjalda til nýggja løgtingshúsið á Eystaruvág, men mugu fyrst gjalda fyri allan sirkusbygningin við Tinghúsvegin, og hann er ikki liðugur enn. Aftrat hesum skal leggjast rokningin, sum áløgd verður hvørjum borgara í Tórshavnar Kommunu fyri keypið av nýggjum býráðshúsi.

Hetta verður sanniliga eitt dýrt fornøyilsi.

Tá borgarstjórin spurdi Palla Gregoriussen, arkitekt, hvat løgtingslimirnir søgdu til projektið, og fekk at vita, at teir klappaðu, mælti hann eisini okkum at klappa. Tað gjørdu vit so.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.